# Kertugluggi

Ein Kertugluggi hugnar um í stovuni, í kamarinum ella aðrastaðni, og tað er sera jólaligt, at gera saman.Soleiðis gera tit:

**Mynd 1**



**Mynd 2**



**Mynd 3**



**1.** Tað sum tit síggja á mynd **1.,** er tað, ið skal brúkast. Hvítt, gult og appelsingult pappír. Lím, lineal, blýant og saks 

**2.** Teknað strikur, so hvíta pappírið verður til trý ljós. Ein A4 síða er 21 cm breið, so hvørt ljós kann verða 7 cm. Síðani tekna tit skap, ið líkjast bløðum. Tey gulu eru størri enn tey appelsingulu. Tá tað verður límað saman, líkist tað rættiligum eldi, sum tíbetur ikki er vandamikil :)

**3.** Klippið ljósini út uppá longs. Sum tit síggja á mynd **2.**, havi eg teknað *tríggjar* longdir. Gluggin verður vakrari, um ljósini ikki hava somu hædd. Tit kunnu sjálvi avgerða, hvussu høg tey at enda eru, við at brúka listarliga eygað. Klippið síðani logarnar út. Límað tað appelsingula á tað gula á ta einu síðuna, sum skal venda úteftir.

Ljósini festast á rútin, eitt og eitt, so tað verður til eina røð av ljósum, niðast á rútinum. Síðani seta tit ein loga á hvørt ljós. Eitt sindur av límí frá einari límstift, skal koyrast á hvørt horn og eitt sindur í miðjuni. Síggja tit, at meira krevst, so er bara at koyra á. Einki lím er líka, eiheldur pappír.



*Tá tú hyggur inn*



*Tá tú hyggur út*

***Ráð:*** *Eiga tit ikki gult og appelsingult pappír, ber til at teknað á vanligt pappír við tusj ella litblýantum, og klippa logan út aftaná.*
***Hugskot til seinni:*** *Tit kunnu eisini brúka silkipappír, sum er verri at fáast við, tunt og skrædnar lætt. Royn við vanligum pappíri fyrst, so royndirnar við tí, kunnu brúkast til annað slag av pappíri, tá tit royna aftur.*

*Góðan tekni, klippi og límihug,*
*heilsan,*
*Ljóðfílurin og Jensina*